# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SO NÓGV VÓRU LYFTINI VERD

Eingin ivi skal vera um, at almenna Kringvarpið hevur ein public service sáttmála fyri neyðini. Ein stovnur, sum ikki hevur eitt yvirskipað mál - eitt virðisgrundarlag - hevur fyri sovítt ongan legitimitet í samfelagnum, og tí er sáttmálin eitt sjálvsagt krav. Eitt krav, sum bæði stovnurin sjálvur og almenningurin við fullum rætti kann seta.

Sáttmálin inniheldur eisini nógv góð orð, góðar ætlanir og fagrar visiónir, men so er eisini tað mesta sagt.

Tí landsstýriskvinnan hevur »gloymt« ein av hornasteinunum í Kringvarpssemjuni, sum varð gjørd fyri skjótt nógvum árum síðani.

Hvør sum ein vóru politisku flokkarnir tá samdir um, at Kringvarpið skuldi missa rættin at kappast um handilsligu lýsingarnar, men at fíggjarlig kompensatión skuldi latast Kringvarpinum fyri hendan missin. Ein setningur, sum Helena Dam á Neystabø á tingsins røðarapalli hevur sagt seg vilja arbeiða fyri.

At einki er hent á tí økinum – samstundis sum Kringvarpið ikki er sloppið at hækkað kringvarpsgjaldið, hevur viðført eina kappingarstøðu, sum als ikki sømir seg einum demokratiskum samfelag. Eina kappingarstøðu, har almenni miðilin við 60-70 milliónum í rygginum er farin í knallharða kapping við privatu aktørarnar, sum tískil í




besta føri kunnu veita eitt munandi skert íkast til demokratiska orðaskiftið her á landi, og í ringasta føri als ikki hóra undan.

Heldur enn at halda semjuna, sum á sinni varð gjørd, hevur Helena Dam á Neystabø gjørt livikorini hjá privatu miðlunum enn verri við uppskotinum.

Kringvarpið er styrkt við eyka innkrevjingarmøguleikum fyri Kringvarpsgjaldið. Tað ger stovnin føran fyri at dubba seg enn meira í kappingini um lýsingarnar, og sjálvandi verður tað úrslitið. Tí tær milliónir, sum nú kunnu vinnast eyka, eru langt ífrá nóg mikið, um føgru orðingarnar og ætlanirnar í nýggja sáttmálanum skulu røkkast.

ES: Annars er einki nýtt í eini serstakari játtan til talgildan av savninum hjá Kringvarpinum. Hana hevur stovnurin nevnliga havt í fleiri ár. Kundi verið áhugavert at vita, hvussu nógv er talgilt fyri ta upphæddina.

**» Helena Dam á Neystabø hevur gjørt livikorini hjá privatu miðlunum enn verri**

# Óluvá ræðist Miðlahúsið

Ólvuá Zachariasen, sum er tíðindaleiðari í útvarpinum hjá Kringvarpinum sigur, at hon bíðar í spenningi eftir eini kringvarpssøgu úr Miðlahúsinum.

Tað eru so mong fólk í leiðandi starvi, sum eru komin illa fyri av at skriva óumhugsaðar viðmerkingar á Facebook. Um Óluva Zachariasen er ein teirra, fáa vit kanska at síggja, men tað tykist ikki serliga búgvið, tá tíðindaleiðarin í landsins fremsta public service stovni, Kringvarpi Føroya, speirekur kappingarneyta á Facebook.

Á vegginum hjá sær á Facebook skrivar Ólvuvá Zachariasen, tíðindaleiðari í útvarpinum hjá Kringvarpinum, at hon »*bíðar við stórum spenningi eftir, hvat man fara at vera dagsins Kringvarps-søga úr Miðlahúsinum í morgin:-) Onki ov smátt til at rudda forsíðuna í Vágsbotni;-)*«

Um tað er public service sáttmálin, sum Helena Dam á Neystabø hevur undirskrivað, sum er orsøkin, er ikki gott at vita, men Helena Dam á Neystabø hevur nú brotið ta politisku semjuna, sum fyri fimm árum síðani varð gjørt um, at Kringvarpið skuldi missa handilslýsingarnar og harvið ikki vera í ójavnari kapping við privatu miðlarnar.

Á vegginum hjá tíðindaleiðaranum í Kringvarpinum spyr fyrrverandi tíðindaleiðarin í sjónvarpinum, Øssur Winthereig, um hon meinar við raðfestingina hjá Kringvarpinum at senda fólk at dekka kríggið í Afganistan. Til hetta svarar tíðindaleiðarin, at »*hon er bara ein av mongum, mongum raðfestingum, sum okkara fittu starvsbrøður/systrar halda vera øgilia áhugaverdar. Tjaaaaeee... hví skal mann grenja um at fáa so nógva ókeypis reklamu hjá kappingarneytanum:-)*«





**» Vit hava serstakliga góðan formann**

ANFINN KALLSBERG SÍÐA 6



**» Ræður um at vera opin um sjúkuna**

ANNIKA K. LJÓSSTEIN SÍÐA 10-11

# TAKS funnið 14 milliónir



Freistin at lata inn sjálvuppgávu við roknskapi til TAKS fyri 2009 var 3. mai.

Síðani tá hevur TAKS higartil í sínum eftirlitsarbeiði hugt nærri eftir umleið 250 sjálvuppgávum við atknýttum roknskapum. Hetta hevur ført til, at TAKS hevur fyribils gjørt rættingar í skattskyldugu inntøkuni fyri nakað meira enn 14 mió. kr. hjá hesum bólkinum av skattgjaldarum. Talan er serliga um hækkingar og um frádráttir, sum ikki eru loyvdir.

Øll hava nú fingið uppgerð fyri skattaárið 2009, men TAKS fer nú í sínum framhaldi av eftirlitsarbeiðinum at hyggja nærri eftir útvaldum sjálvuppgávum og roknskapum.

Sagt verður, at eftirlitsarbeiðið hjá TAKS er málfest í Mál- og avrikssáttmálanum, sum TAKS arbeiðir eftir.

# Dimma verjir lokalpatriotismu í Havn

Lokalblaðið í Norðoyggjum heldur, at hóast Dimmalætting nú hevur fingið nýggjan eigara, sum er ættaður úr Norðoyggjum, so er lítið broytt á størsta lokalblaðnum í Havn, sum Norðlýsið rópar Dimmalætting.

– Ein av blaðstjórunum á Dimmu slær ring um Poul Michelsen, ið alla sína tíð í politikki hevur verið ímyndin av lokalpartiotismuni í høvuðsstaðnum, skrivar Norðlýsið í síni oddagrein hesa vikuna.

– Tað er ótrúligt, at Dimma soleiðis skal hálova lokalpolitisku úrslitunum hjá Poul Mikkelsen, sum ikki minst var ein sera góður borgarstjóri fyri Havnina, og har borgarstjórahógvarnir fleiri ferðir eisini hava stungið undan í Tinginum.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*